Dagf. 31. mai 2021
HMR J. nr. 21/08885-4

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-148/2020 eftir § 52a í tingskipanini um palliatión, frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinnu

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu verður arbeitt við at seta í verk tilmælini um palliatión í Føroyum?
2. Hvussu nógvar pengar hevur heilsuverkið fingið játtaðar í 2021 til palliatión?
3. Væntar landsstýrismaðurin at koma á mál við tilmælunum um palliatión í 2022 sum ætlað?

Til spurning 1
Á heysti í fjør var skjøtul settur á arbeiðið at gera eina nýggja krabbameinsætlan fyri Føroyar. Ein partur av arbeiðssetninginum er at orða tilmæli um, hvussu tað kann veitast ein so góð palliativ hjálp, sum til ber, seinastu tíðina fólk liggja sjúk. Í arbeiðssetninginum er viðmerkt, at hesin partur kann verða grundaður á tilmælið um palliatión frá 2019. Eftir ætlan verður nýggja krabbameinsætlanin handað landsstýrismanninum í september. Eftir hetta verða tilmælini viðgjørd við atliti at fáa sett ætlanina í verk – í hesum sambandi eisini tann palliativa partin.

Til spurning 2
Hóast ætlanin enn ikki er handað, verður arbeitt við at styrkja og uppnormera tann palliativa partin í sjúkrahúsverkinum. Í 2021 eru m.a. 600 tús. kr. settar av til styrkja tað palliativa økið við ein sjúkrarøktarfrøðingi aftrat.

Til spurning 3
Tað er torført at meta um, hvørt komið er á mál við tilmælunum um pallitatión í 2022, sum ætlað. Tilmælini í ætlanini fevna um heilsuøkið og kommunala økið. Hinvegin so ætlar landsstýrismaðurin at arbeiða fyri, at palliativa økið verður raðfest, samskipað og styrkt hetta samgonguskeiðið.

Heilsumálaráðið, 26. mai 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður